Nils Finsensgøta 32 - 2. Hædd
100 Tórshavn
Faroe Islands

T: +298 522011
T: +298 532011
barnabati@barnabati.fo
www.barnabati.fo

12. desember 2016

Góðu næmingar og foreldur

Saman við Barnabata fara vit at gera eina landsfevnandi spurnakanning millum allar 8. floks næmingar í Føroyum. Kanningin er ein granskingarverkætlan, ið miðar eftir at fáa nýggj ítøkilig tøl uppá tilburðir, sum kunnu upplivast sum skelkandi. Tá vit menniskju eru úti fyri onkrum ræðandi ella skelkandi, er vanligt, at vit eru skelkað í eina tíð, áðrenn vit sissast aftur. Tó kann eisini vera, at vit koma út fyri onkrum, ið er truplari hjá okkum at sleppa av við, og sum ger okkum óttafull í longri tíð, ella vit t.d. kunnu hava pínufullar endurminningar í dagligdegnum. Tað ber tó til at fáa hjálp fyri hetta, um tað hevur ov stóra ávirkan á gerandisdagin og vísindin roynir alla tíðina at fáa til vega nýggja vitan, soleiðis at vit bæði kunnu fyribyrgja og hjálpa.

Spurnarblaðið tekur áleið ein skúlatíma at svara. Tit verða sjálvandi dulnevnd, so ongin veit hvat júst tit hava svarað. Tá samlaðu úrslitini verða løgd fram í vísindaligum høpi, verður tað eisini bert gjørt sum bólkur. Hvat tit svara, ella um tit velja at luttaka ella ikki, fer ikki at fáa ávirkan á tykkara skúlagongd. Við hesum brævi biðja vit tískil um samtykki til luttøku í kanningini. Allir næmingar hava sjálvandi rætt til ikki at luttaka, og í fall verða tit biðin um at venda tykkum til skúlastjóran ella flokslæraran.

Vit eru sera takksom, um tit ynskja at luttaka og vóna, at tit svara so erligt sum tilber. Úrslitini frá hesi kanning verða bæði brúkt til at fremja størri vitan og vónandi fleiri hjálpartiltøk í Føroyum og úti í heimi.

Hava tit spurningar ella ivamál um kanningina, kunnu tit venda tykkum til Tóru Petersen. Og tørvar tykkum hjálp ella vegleiðing um okkurt skelkandi tit hava upplivað, kunnu tit antin venda tykkum til Barnabata (http://www.barnabati.fo/skriva-braev-til-tu-eg-radgevingina/), tykkara heilsusystur, lækna, ella ein vaksnan, sum tit kenna tykkum trygg við.

Vinarliga

Barnabati
Djóni J Eidesgaard
djoni@barnabati.fo
Tlf 522011

Tóra Petersen
Landssjúkrahúsið, Phd, løggildur psykolog
torapetersen@gmail.com
Tlf 220460

Ida Ankerfelt & Katrin Mohr, sálarfrøðilesandi
Ida.ankerfelt@gmail.com & kaatrinmohr@hotmail.com
Tlf: 0045 61 28 98 06 & 0045 27 29 50 65